## Scholes mátti skaddur út

Bert 16 minuttir vóru farnir av dystinum millum AaB og Manchester United, tá Paul Scholes noyddist at fara av vøllinum. Talan var um liðbandsskaða í knænum, og venjarin hjá europisku meistarunum, Sir Alex Ferguson, óttast, at talan verður um drúgvan steðg. – Vit vita enn ikki, hvussu álvarsligur skaðin er, men talan er um liðbandsskaða í knænum, og so mugu vit síggja, hvussu hetta spælir av.



## Flo steðgar

38 ára gamli Håvard Flo, sum millan annað hevur gjørt um seg í AGF, Werder Bremen og Wolverhampton, gevst nú við fótbólti. Luft- og kropssterki áleyparin hevur síðani 2001 spælt við Sogndal, har hann eisini hevur skotið nógv mál – sjey í sjey dystum hetta kappingarárið – sigur nú, at hann leggur gaggurnar á hillina- Kanska kundi eg trýst kroppin til eini tvey ár afturat, men fyri teir, sum skulu taka við eftir meg, er helst lættast, um steðgi her og nú, sigur Flo við NRK.

# Heimurin fylgir við Føroyum



*Vónandi verður hetta sjónin, sum bíðar føroysku spælarunum, tá teir trína inn á Tórsvøll um 10 dagar*

**Aðalskrivarin hjá FSF váttar, at áhugin fyri heimadystinum hjá Føroyum móti Eysturríki er væl størri, enn hann vanliga er fyri føroyska landsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað sendi ein skelk gjøgnum allan fótbóltsheimin, tá føroyska fótbóltslandsliðið tann minniliga 12. september í 1990 vann 1-0 á Polster, Rodax og hinum stjørnunum hjá Eysturríki.

Talan var um fyrsta fetið hjá Føroyum í altjóða undankapping, og hóast nógv vatn er runnið í ánna tey 18 árini síðani tað, so er áhugin framvegis stórur fyri føroyska landsliðnum. Og áhugin er ikki minni, nú Føroyar hava møguleika at endurskapa sensatiónina, tá Eysturríki kemur á vitjan um 10 dagar.

- Tað er altíð eitt sindur at gera í sambandi við landsdystir, men hesa ferð er talan um óvanliga nógvar fyrispurningar. Líka úr Japan hava fjølmiðlar víst dystinum ans, og eingin ivi er um, at júst hesin dysturin vekir minnir so øgiliga nógva aðra staðni enn bara í Føroyum.

Hvussu stórur føroyski áhugin er, ber illa til at siga, fyrr enn vit síggja fjøldina, sum leitar sær á Tórsvøll annan leygardag. Dagurin í dag markerar tó bryjanina til ætlanina hjá Miðlahúsinum um at fylla Tórsvøll, og tað er eitt átak, sum FSF tekur ímóti við opnum ørmum.

- Eg haldi tað vera ómetaliga gott, at Miðlahúsið tekur stig til eitt slíkt átak. Tað er eingin ivi um, at spælararnir hava stóran tørv á stuðlinum, sum ein stór og íðin áskoðarafjøld kann geva. Tað kann hava við sær, at orkan verður tað lítla pettið eyka, sum er so alneyðugt í slíkum dystum. So tað er sjálvandi mín vón, at hetta er eitt átak, sum fer at eydnast væl, sigur Ísak Mikladal.

Neistin-Kyndil 30-17 (13-10):

# Kyndil aftur fyri stórtapi

**Kvinnurnar hjá Neistanum fingu gleið á eftir steðgin, og so var ógvuliga avmarkað, hvat Kyndil fekk gjørt við úrslitið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað endaði við stórsigri til Neistakvinnur, tá tær í gjár spældu grannauppgerð móti Kyndli.

Undan steðginum hevði Neistin tað annars alt annað enn lætt, men tær megnaðu tó at fara frá 10-10 til 13-10 seinastu fimm minuttirnar undan floytinum.

Eftir steðgin skrædnaði tó veruliga millum partarnar. Neistin økti javnt og samt um leiðsluna, og tað eydnaðist ongan tíð Kyndli at svara tað allar minsta aftur. Eisini tí Neistin við eini bakketu, sum nú kann skjóta útifrá, tykist hava fleiri streingir at spæla uppá, enn tær høvdu í fjør, tá liðið kanska var besta kontraliðið í landinum, men har tær sjáldan megnaðu at leggja spælið um.

Hjá Kyndli var talan um næsta stórtapið á rað, og tí er einki at ivast í, at venjararnir báðir hava nógv at arbeiða við, um finnast skal aftur á góðu kósina, sum liðið legði seg á í fjør.

### FAKTA um dystin

**Neistin-Kyndil 30-17 (13-10)**
10 min: 4-3
20 min: 7-7
40 min: 20-14
50 min: 24-15
**Málskjúttar**
**Neistin**: Trine Mayland 7(1), Anja Heinadóttir 6, Anne Kyldævald 5(1), Nicoleta Radu Hansen 4, Elin Staksund 3, Annika Ljósstein 2, Unn Kragesteen 2, Heidi Maria Akselsen 1
**Kyndil**: Marina Zilko 6, Jacklin Durhuus 5, Linda Johannesen 2, Rakul Napoleonsdóttir 2, Jórun Ludvig 1, Barbara Egilstrøð 1
**Brotskøst**: Neistin 4
**Útvísingar**: Neistin 3, Kyndil 4
**Diskvalifikatión**: Kyndil 1 (Beinleiðis reytt)

# Stovna føroyskt Kendo-felag

**Ætlandi verður nú sett á stovn felag, har limirnir fáa møguleika at læra japanska samurai-fikting**

KENDO
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í skrivi sigur Dansk Traditionel Kendo Forbund, at tey nú leita eftir persónum, sum kunnu vera við til at stovna eina føroyska deild av felagnum.

Kendo er japansk fikting, sum hevur sínar røtur í samuraisiðvenjuni. Og við at stovna eina føroyska deild er ætlanin at stovna eina føroyska deild, sum kann víðka um útbreiðsluna av ítróttini.

Í skrivinum verðu at enda sagt, at føroyingar, sum hava áhuga í at stovna eina føroyska deild, eru væl komnir at venda sær til danska felagið. Upplýsingar um felagið kunnu annars síggjast á www.kendo-dk.org.

*Enn er einki felag fyri Kendo í Føroyum, men hetta skal ætlandi setast á stovn í næstum*

